# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Føðingar

22. august fingu Alda í Ólavsstovu og Jens Johan Dam, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4045 gr.

24. august fingu Marianna Heinesen og Súni Davidsen, Argir, eina dóttur. Hon var 47 cm long og vigaði 2075 gr.

25. august fingu Sonja Hvidbro Andreasen og Baldur Bragason, Klaksvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 2700 gr.

25. august fingu Malan Horn og Mads Kristoffur Hentze, Sandur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3800 gr.

27. august fingu Janie W. Høgnesen og Brynjálvur Petersen, Kvívík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4050 gr.

28. august fingu Súsanna Leo og Mortan Bech, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4075 gr.

28. august fingu Sára og Zvonko Mrdalo, Skála, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4125 gr.

30. august fingu Kira Hendriksdóttir og Jóanis Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4325 gr.

30. august fingu Sóleyð Staksberg og Rúni Kruse, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2285 gr.

30. august fingu Randi Meitil og Sjúrður P. Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 58 cm. langur og vigaði 4590 gr.

31. august fingu Dinna og Sigtór Isaksen, Tjørnuvík, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3100 gr.

31. august fingu Vimal og Jan Mortensen, Preston, UK, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3300 gr.

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Hjørleif Magnussen 85 ár



Í morgin, sunnudagin 4. september, verður Hjørleif Magnussen í Klaksvík 85 ár. Hann var í meiri enn fjøruti ár tollari í Klaksvík.

Hjørleif er ættaður úr Húsavík. Foreldrini vóru Magnus Magnussen, sum var ættaður úr Húsavík og var lærari frá 1914 og til 1957, og Alvilda, fødd Wægter og ættað av Bakkahellu í Havn. Tey áttu átta børn: Manni, sum búði á Als, Gunnvør, sum býr í Randers, Brynhild, sum búði á Sandi, Hjørleif, Kjartan, sum býr í Húsavík, Erling, sum búði í Húsavík, Hákun, sum búði í Havnini og Elinborg, sum býr í Havnini.

Sum flestu føroysku dreingir í tríati árunum, so fór Hjørleif til skips, tá ið hann hevði fingið prestsins hond á høvdið. Í 1938 fór hann til Danmarkar, og hann var við skúlaskipinum Danmark, sum eitt nú var hinumegin Atlantshavið. Hjørleif hevði ætlað sær at fara undir útbúgving niðri, men heimurin var so ótryggur í 1939, at hann gjørdi av at flyta aftur til Føroya. Túrin eftir, at Hjørleif hevði verið við skúlaskipinum, varð tað tikið í USA.

Eftir at hann var komin aftur til Føroya, fór Hjørleif upp á skúla, og saman við fýra øðrum leyk hann stýrimansprógv í oktober 1943. Hjørleif sigldi síðani sum bestimaður við snurruváðsbátinum Eliana. Farbróður hansara, Jóhan Petur, átti og førdi bátin, sum eitt nú fiskaði í Norðsjónum. Eisini sigldi Hjørleif við Borglín og Jóhonnu Sofíu.

Hjørleif giftist 12. januar í 1947 við Olevinu, kallað Ulla, fødd Hansen og ættað úr Árnafirði. Foreldur hennara vóru Guttorm Johannes Hansen og Anna Julie, fødd Sørensen, ættað av Grømma á Viðareiði. Ulla var næstelst av teimum fimm børnunum hjá teimum. Hon vaks upp á Vágsheygnum í Klaksvík hjá fastur síni, Helenu, og manni hennara Michael Sólheyg. Ulla fylti 85 ár 28. januar í ár. Ulla og Hjørleif bygdu á Vágsheygnum. Har hava tey búð í góðum og snøggum heimi, og har búgva tey framvegis. Ulla og Hjørleif eiga trý børn - Bjørg Fjalsbak, Myrna Sørensen og Magnus Magnussen. Bjørg og Magnus búgva í Klaksvík, og Myrna býr í Húsavík. Hjørleif eigur seks barnabørn og tvey langabbabørn.

Lívsstarvið hjá Hjørleifi var at vera tollari. Eftir at Føroyar í 1948 høvdu fingið heimastýri og Gjaldstovan var yvirtikin, vórðu seks tollarar settir í alment starv. Ein var settur í Klaksvík, og tað starvið fekk Hjørleif, sum tók við starvinum 1. januar í 1949. Hann var einsamallur tollari í meiri enn tíggju ár. So varð svágur hansara, Børge Simonsen, settur afturat honum. At vera einsamallur tollari í Klaksvík í fimmti árunum og harvið at hava vakt alt samdøgurðið og alt árið var ikki bara sum at siga tað. Umframt mongu skipini úr Klaksvík og aðra staðni frá úr Føroyum, sum vitjaðu á Vánni, vóru tað eisini nógvir norskir línubátar og eingilskir trolarar, sum vóru á Klaksvík og krokaðu og avgreiddu ørindir.

Hjørleif er stillførur og fryntligur, og tað vóru góðar dygdir at hava, tá ið nógv var at gera, og tá ið boð vóru eftir honum bæði tíðliga og síðla. Fyrru árini var hann at síggja á súkklu, so var hann á prutli, og tey síðstu tollaraárini koyrdi hann í bili.

Nú eru tað fimtan ár síðani, at Hjørleif í 1990 fall fyri aldursmarkinum og fór úr tollarastarvinum. Hann er framvegis væl fyri, og hann fæst framvegis við seyðin, sum alla tíðina hevur verið frítíðarítrivið hjá honum.

85 ára dagurin verður í morgin, og tá verður møguleiki at heilsa upp á Hjørleif millum klokkan 4 og 7 hjá Bjørg og Odd Fjalsbak, sum búgva á Nýggjavegi.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Símun Rasmussen**
**Strendur**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri vøkur orð í kapellinum, heiminum og kirkjuni.
Tøkk til tykkum øll, sum hjálptu til við ervinum og vælvild frá Sjóvar kommunu.
Tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Tøkk til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Jóna**

# Ásmundur V. Johannesen 75 ár



Í morgin, sunnudagin 4. september, verður Ásmundur Vágsheyg Johannesen í Havn 75 ár. Hann var í mong ár lærari og eisini fyristøðumaður á kostdeildini í Hoydølum.

Ásmundur er ættaður úr Klaksvík. Foreldrini hjá honum vóru Anna Malena Vágsheyg úr Klaksvík og Jógvan Sigurd Johannesen, sum var ættaður úr Skopun. Ásmundur var elstur av trimum systkjum. Systrarnar eru Henni Elisabeth, sum giftist til Noregs og Maria, sum býr í Havnini.

Ásmundur leyk matematiskt studentsprógv í 1950, tá ið studentaskeiðið húsaðist á VBV. Í 1954 leyk hann læraraprógv á Føroya Læraraskúla. Sama árið giftist hann við Elini fødd Dahl og ættað úr Havnini.

Ásmundur var fyrstu árini lærari í Kommunuskúlanum, Millum- og Realskúlanum og á Argjum frá 1956 og til 1964. Í 1964 fór Ásmundur í starv á studentaskúlanum, sum tvey ár frammanundan var fluttur niðan í Hoydalar, og tað var har uppi, at Elin og hann vóru tey flestu av teirra virkisárum.

Ásmundur var lærari í realskúlanum, og seinni undirvísti hann á HF skeiðnum, sum varð sett á stovn í 1974. Elin var á skrivstovuni, og frá 1966 og til 1979 undirvísti hon eisini í fimleiki. Frá 1971 og fram til 1991 var Ásmundur fyristøðumaður á kostdeildini í Hoydølum, har tey búðu í ovastu hæddini í nýggja húsi á gamla Sanatorinum.

1958-1959 var Ásmundur formaður í Havnar Fimleikafelag. Fyrstu royndirnar við flogbólti í Føroyum mundu vera á Lærarskúlanum og Studentaskúlanum. Ásmundur var formaður í flogbóltsdeildini hjá ÍSF 1968-1972, og harvið var hann eisini stjórnarlimur í ÍSF.

Hesi seinastu árini hava Elin og Ásmundur verið nógv í Tilhaldinum fyri eldri, sum er í gamla Føroya Banka. Ásmundur er nevndarlimur.

Elin og Ásmundur eiga trý børn. Pauli í Sandagerði er elstur. Hann býr í Vejle. Anna Erenbjerg er í miðjuni. Hon býr í Nakskov, og Sjúrður Johannesen, sum er yngstur, býr í Hoyvík.